tíðindablaðið **sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Niclas Johannesen
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Hvat vil sambandsflokkurin?

## *Oddagrein*

TAÐ eru hørð orð, ið fella í hesum døgum, frá høgtstandandi sambandsmonnum um teirra egnu floksleiðslu ella rættari formannin Edmund Joensen. Í einum sera bersøgnum brævi, sum verður prentað í Sosialinum í gjár, ger fyrrverandi tingmaðurin í flokkinum Atli Hansen bart og biðjur formannin í flokk-inum leggja frá sær. Hetta er ikki nøkur nýggj tala, tí sami persónur hevur áður víst á ónøgd sína við floksformannin. Tað nýggja er tó, at hesaferð tengir fyrrverandi sambandstingmaðurin tørvandi formansevnini saman við spurninginum um ríkisrættarligu støðu Føroya.

TAÐ hevur eisini undrað mong, at formaðurin í sambandsflokkinum nú í longri tíð hevur brúkt so nógvar kreftir uppá at leggja eftir hinum andstøðuflokkinum, Javnaðarflokkinum. Hví hevur hann ikki heldur brúkt tíð og orku uppá landsstýrið verður spurt? Um so er at formaðurin í Sambandsflokkinum bara hugsar taktiskt og brúkar alla orkuna uppá at fáa hendur á nøkrum av sambandsatkvøðunum í Javnaðarflokkinum, so er øll orsøk til at tala at. Tí hóast ein flokkur sjálvur hevur brúk fyri at „hugsa um atkvøðurnar“, so má tað vera eitt minstakrav til ein demokratiskt valdan flokk, at hann rekur politikk heldur enn at reka taktikk.

SAMBANDSFORMAÐURIN átti eisini at vitað, at tað tænir neyvan einum møguligum framtíðar samstarvi við Javnaðarflokkin at gera hann til skotskivu í einum og øllum. Hetta hava vit sæð Sjálvstýrisflokkin gera nú í eina tíð, og hetta fer ein tileinkisgjørdur Sjálvstýrisflokkur helst eisini at kenna sviðan av eftir næsta val. Ikki tí - flokkar eiga ikki undan einum vali at avskriva samstarvsmøguleikar. Men kortini má sigast, at Sjálvstýrisflokkurin hevur borið seg ómetaliga skitið og ljótt at móti Javnaðarflokkinum síðani síðsta val. Spurningurin er tí, um Sambandsflokkurin ætlar sær at halda fram at ganga í fótfetum Sjálvstýrisfloksins við tess hetz móti Javnaðarflokkinum.

JAVNAÐARFLOKKURIN hevur valt at lurta og geva sítt íkast til ein framtíðar útvikling á tí ríkisrættarliga økinum. Og tað er rætt, hóast tað uttan iva eisini eru ymiskar meiningar millum javnaðarfólk um hesa gongd. Men flokkurin hevur so valt at hugsa um politikk heldur enn um taktikk. Og tað kundi eitt nú sambandið lært av.

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Oljuhavn á Sundi???!!!



Eg síggi í Sosialinum í dag, har blaðstjórin hevur viðtal við Poul Mohr. Tað er eingin loyna, at Poul Mohr er íðin forsprákari fyri oljuútgerðarhavn á Sundi. Eisini verður Havnin nevnd sum eitt alternativ.

Eingin kann lasta Poul Mohr fyri at vilja hava virksemi av eini slíkari havn í miðstaðarøkinum, tí tað er har hann býr og hevur sítt ivrki, men tá maðurin brúkar so skitin vápn, sum hann ger í Sosialinum leygardagin, har hann beinleiðis lýgur um bæði Drelnes og Skálafjørðin, tá verður tað ovboðið.

Rætt er tað, at Smyril ikki legði at á Drelnesi fríggjakvøldið, tí ódnarveður var, men leygarmorgunin sigldi hann aftur av Drelnesi. Tað ber altíð til at sleppa á land í Suðuroynni, líka mikið hvussu veðrið leikar í, tí vit eiga teir bestu firðir í landinum. Alternativið er, at Smyril kann leggja at á Gomlukaj, og skuldi tað gingið heilt gali, so hava vit eisini Vág, sum eitt annað alternativ.

Nú eg nevni Vág, kann eg upplýsa, at eini tíggju fiskiskip norðanfjørðs lógu leygardagin á Vágsfirði og krokaðu. Har var púra kyrt, meðan havaldurnar uttanfyri vóru fleiri metrar høgar. Tað sá út sum ein stórbýur uttanfyri molan um kvøldið.

At tað skuldi vera fínt at liggja hjá skipum inni á Sundi ljóðar ógvuliga løgið, tí skip kunnu ikki liggja har, tá logn er. Hann kann bara spyrja á Smyril-Line, hví Norrøna ikki kundi liggja á Sundi, og samstundis spyrja hvussu nógvar endar hon sleit, og tað var í góðum veðri. Sund hevur heldur einki alternativ, tí Havnin er heldur einki kyrrupláss. Leygardagin sleit Smyril tríggjar trossar, sjálvt um hann lá við bæði høvuðsmaskinunum bóvskrúvuni í gongd. Skiparin var í dýrastu neyð, men lukkutíð kom stundin, tá skipið skuldi sigla, og vandin var av. Eisini mátti Mýlingur ríma, sum lá framman fyri Smyrli.

Mær er fortalt frá álítandi keldu, at lendingin á Sundi, er í so ringum standi, tí hon stendur til at rapa út á fjørðin. Hon er heldur ikki bygd til oljuútgerðarhavn, tí dekkið lúkar als ikki tey krøv, sum ein slík havn eigur at hava.

Nei eg sigi sum ein ávísur maður einaferð segði, at havnin í Havn verður ongantíð góð, fyrr enn hon verður »**hermetiskt lukkað**«, og tað sama kann sigast um lendingina inni á Sundi.

**Kai Vágfjall**

# MR-skannarin tikin í nýtslu

*Nýggi magnetskannarin, Landssjúkrahúsið fekk til gávus í 1998, er nú tikin í nýtslu*



JOHN JOHANNESSEN

Umsíðir er nýggi magnetskannarin á Landssjúkrahúsinum tikin í nýtslu. Landssjúkrahúsið fekk skannaran til gávus frá Tryggingarfelagnum Føroyar á heysti 1998, tá Tryggingarsambandið varð lagt um til alment parafelag.

Men orsakað av trongu hølisviðurskiftunum á Landssjúkrahúsinum, bar ikki til at fáa skannaran settan upp fyrr enn stutt fyri jól í 1999. Neyðugt var við umfatandi umbyggingum á røntgendeildini, áðrenn skannarin kundi setast upp.

Í januar hava starvsfólkini á røntgendeildini lært seg at brúkt skannaran. Hetta hava tey gjørt við at kanna hvørt annað. Mn nú er tey klár at lata sjúklingarnar sleppa framat.

Kanningin við einum MR-skannara fer fram á tann hátt, at sjúklingurin verður lagdur á eitt borð í einari 13 tons tungari magnet.

Tá sjúklingurin er komin at liggja, verða rediobylgjur sendar inn í sjúklingin. Radiobygjurnar verða síðani steðgaðar, og fer sjúklingurin sjálvur tá at senda út radiobylgjur. Hesar verða móttiknar av einari antennu, haðani signalini fara inn á eina teldu, sum ger myndir av kannaða økinum.

Kanningin við MR-skannaranum er heldur drúgv. Tað tekur umleið ein tíma at verða kannaður, og alla hesa tíðina skal sjúklingurin liggja stillur.

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra dóttir, móðir, vermóðir og omma okkara

**BJØRG MATRAS**
Tórshavn

andaðist 30. januar, 64 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju mikudagin kl. 13.00.

**Martha,**
**Marna, Erla og Kára**

---

†

Kunngjørt verður ætt, vinum og kenningum, at kæri maður mín, bróðir og svágur okkara

**ALVI OLSEN**
ættaður úr Leirvík, búsitandi í Tórshavn

fór heim til Harran mánadagin 31. januar 2000, 62 ára gamal.

Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum mikudagin kl. 18.00.

Jarðarferðin verður úr Ebenezer hósdagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*

**Dina**

Tey, ið ynskja at senda blómur ella krans, kunnu senda eina gávu til Zarepta, konto í peningastovnunum.

---



# Beiða semjan finnst millum Fólkaflokkin og andstøðuna

*Trúgvi F. Guttesen, næstformaður Sambandsfloksins, heldur besta møguleikan fyri breiðari semju í spurningninum um ríkisrættarligu støðuna vera millum Sambandsflokkin, Fólkaflokkin og Javnaðarflokkin*



*Næstformaður Sambandsfloksins, Trúgvi F. Guttesen, heldur, at ein semja millum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin í ríkisrættarliga spurninginum hevði verið tann besta*

JOHN JOHANNESSEN

– Uppskotini hjá Fólkaflokkinum og Javnaðarflokkinum um broytingar í ríkisrættarligu støðuni renna saman, og tað sama er við uppskotinum hjá Sambandsflokkinum. Tí síggi eg størstan møguleika fyri breiðari semju um ríkisrættarliga spurningin millum Fólkaflokkin, Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin.

Trúgvi F. Guttesen, næstformaður í Sambandsflokkinum, er samdur við Atla Hansen í, at Sambandsflokkurin eigur at vera við í arbeiðinum at fremja broytingar í rískisrættarligu støðuni. Men hann er ikki eins bersøgin, sum floksfelagin úr Gøtu.

Atli Hansen segði í viðmerking í Dimmalætting og Sosialinum í gjár , at leiðslan í Sambandsflokkinum er ein meinbogi fyri at finna loysn á ríkisrættarliga spurninginum. Tí mælti hann til at leiðsla floksins verður skift út á komandi landsfundi, so hon ikki longur verður ein forðing fyri, at besta loysnin, floksins vegna, verður funnin á ríkisrættarliga økinum.

### Øll mál kunnu yvirtakast

Trúgvi F. Guttesen vil ikki gera stórvegis viðmerkingar til viðmerkingina hjá Atla Hansen. Men hann sigur tó, at hann aldri hevur merkt, at Edmund Joensen hevur verið ein forðan fyri at finna eina loysn á ríkisrættarliga spurninginum. Tvørturímóti vísir Trúgvi F. Guttesen á, at Edmund Joensen virkin var við í bólkinum, ið arbeiddi við at gera uppskotið »Nýggjar Tíðir«.

– Sjálvsagt kann Sambandsflokkurin vera við til at finna eina góða loysn á spurninginum um ríkisrættarligu viðurskiftini, og eingin forðing er fyri, at vit kunnu vera við í einari semju ímillum Fólkaflokkin, Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin.

Næstformaður floksins, Trúgvi F. Guttesen, vísir á, at tað í grein eitt í stevnuskrá Sambandsfloksins stendur, at Sambandsflokkurin er altíð til reiðar at gera tær stjórnarligu broytingar, ið tæna fólkinum best. Hann leggur afturat, at uppskotið frá Sambandsflokkinum ger hetta.

– Hetta vísir okkum jú, at tað er lítið og einki, ið forðar fyri, at vit kunnu vera við í einari semju saman við Javnaðarflokkinum og Fólkaflokkinum.

Trúgvi F. Guttesen vísir tó á, at Javnaðarflokkurin í sínum sjálvstýrisuppskoti sigur, at Føroyar og Danmark skulu samstarva sum tvey sjálvstøðug lond í ríkisfelagsskapi. Men Sambandsflokkurin heldur tað ikki bera til hjá okkum at vera fullkomiliga sjálvstøðug í einum ríkisfelagsskapi. Tó ásannar hann, at tað er so nógv, sum kortini ber til í politikki, og tí heldur hann, at semja kann finnast við Javnaðarflokkin um málið.

Hinvegin heldur hann nógv longri vera ímillum Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin í hesum máli.

### Breiður flokkur

Trúgvi F. Guttesen ásannar, at fólk í Sambandsflokkinum eru ójøvn á máli um ríkisrættarligu viðurskiftini. Hann sigur, at Sambandsflokkurin er ein breiður flokkur, men tó er felagsnevnarin fyri limirnar, at øll ynskja at varðveita ríkiseindina.

– Hetta merkir kortini ikki, at vit ikki vilja hava broytingar. Full semja er um, uppskotið, sent varð út, og eg má siga, at eg eri keddur av, at tað ikki hevur eydnast at funnið eina semju við Javnaðarflokkin í ríkisrættarliga spurninginum, sigur næstfomaður Sambandsfloksins.

# Leiðslan eingin forðing

*Lisbeth L. Petersen, tinglimur Sambandsfloksins, heldur tað vera gott við kritikki, men ikki slíkum, sum Atli Hansen vísti á í bløðunum í gjár*



*Nú leikar aftur hart á formann Sambandsfloksins, sum í 1998 vann stríðið móti m. a. Atla Hansen, Bjørn á Heygum, Johs. Martin Olsen og Suna Jacobsen*

JOHN JOHANNESSEN

– Eg haldi tað vera óheppi, at Altli Hansen fer út í eitt alment kjak um leiðslu sambandsfloksins. Hetta er ein spurningur, ið eigur at verða viðgjørdur á landsfundi.

Hetta segði Lisbeth L. Petersen, tingkvinna Sambandsfloksins, við útvarpið á middegi í gjár í sambandi við atfinningarnar hjá Atla Hansen í bløðunum ímóti leiðslu Sambandsfloksins.

Lisbeth L. Petersen er, sambært útvarpstíðindunum, ikki samd við Atla Hansen í, at leiðsla floksins forðar fyri menning. Hon segði tvørturímóti við útvarpið, at Sambandsflokkurin virkar væl, og at arbeiðið í tingbólkinum virkar betur enn í undanfarna valskeiði.

– Eg veit ikki um nakað ætlað formansskifti í Sambandsflokkinum, men tað sær kortini út til, at summi ynskja hetta. Men eg haldi tað vera skeivt at fara í bløðini at skriva um hetta, eins og Atli Hansen ger, tí tað kann skaða flokkin, segði Lisbeth L. Petersen við útvarpið í gjár.



*Lisbeth Petersen, tingkvinna Sambandsfloksins heldur, at kritikkurin hjá Atla Hansen heldur átti at verið positivur*

**Virkisbygningur til leigu**




Bygningurin hevur tvær hæddir sum kunnu leigast saman ella hvør sær. Hvør hæddin er uml. 150 fermetrar. Bert vinnulig útleigan.

Tekningar og myndir finnast á: http://www.algonet.se/~recovery

Carl August Arge, tel./fax: +46 650 21 700;
e-post: recovery@algonet.se